# West Phoenix skal bora sjeynda brunnin í Føroyum

**Hann er spildurnýggjur og skal bora á landgrunninum næsta vár fyri ENI**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað verður ein av teimum nýggjastu boripallunum í heiminum, júst liðugt bygdur á skipasmiðju í Korea, »West Phoenix«, sum skal bora næsta brunnin á føroyska landgrunninum. Talan er um brunn á Anne Marie leiðini, sum liggur har suðuri við markið, ið italska oljufelagið ENI er fyristøðufelag fyri. Við í samtakinum er eisini Faroe Petroleum og eitt japanskt felag. Tað hevur verið frammi áður, at brunnurin skal borast í apríl 2009, men samtakið hevur kortini víðari rásarúm enn so. Boriloyvið gongur ikki út fyrr enn í 2010. Hinvegin er torført at fáa boripallar, og her hevur ENI eftir øllum at døma gjørt avtalu við Seadrill, sum eigur pallin ella við Total, sum hevur langtíðarleigað pallin í trý ár.

Eftir ætlanini skuldi pallurin bora fyri Total í norskum øki í august í ár, men hetta verður kortini ikki fyrr enn í oktober skrivar heimasíðan hjá Stavanger Aftenblad á heimasíðu síni. Pallurin er í løtuni á Las Palmas, har tað seinasta eftirlitið verður gjørt. Tað hevur enn ikki eydnast at fáa viðmerking frá ENI um henda seinking eisini fer at ávirka boringina í Føroyum næsta ár. Nils Sørensen frá Faroe Petroleum sigur, at hóast teir eru við í boringini, so liggur alt arbeiðið í sambandi við boringina hjá fyristøðufelagnum ENI. Hann dugir ikki at siga, um boringin verður útsett. Summarið er langt, so tað nýtist ikki at merkja nakra seinking.



*Her er hann, boripallurin West Phoenix, sum skal bora brunn á føroyska landgrunninum næsta ár*
*Mynd Seadrill*




## Bókasavnshjálpari/skrivstovufólk

Landsbókasavnið søkir eftir bókasavnshjálpara/skrivstovufólki til ¾ starv frá 1. september 2008 ella skjótast til ber.

ARBEIÐIÐ
- Bílegging og móttøka av bókum og øðrum miðlum
- Avgreiðsla av lánarum í sambandi við lán og afturbering
- Aðrar uppgávur eftir avtalu

FØRLEIKAR
- Hevur kunnleika og royndir í KT á brúkarastigi
- Dugir at orða teg skrivliga á føroyskum og enskum
- Ert røkin
- Hevur góðan tænastuhugburð
- Hevur koyrikort

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

UMSÓKNIR
Umsóknir við avritum av møguligum próvskjølum skulu sendast til:

Føroya landsbókasavn
att: Marjun Patursson
Postboks 61
J.C. Svabos gøta 16
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er fríggjadagin 8. august 2008 kl. 12.00.**

*Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Marjuna Patursson, virkandi landsbókavørð, á tel. 311626 ella á marpat@flb.fo.*

SENDISTOVAN

*Føroya landsbókasavn er tjóðbókasavn føroyinga og savnar inn, skipar, varðveitir og breiðir út vitan um føroysk viðurskifti. Bókasavnið gevur almenninginum atgongd til kunningartilfeingi savnsins, ið umframt bøkur og tíðarrit eisini fevnir um m.a elektroniskar kunningartænastur, dátugrunnar og internet.*



# JUVEL II - missiónsskip

Vit vilja hervið takka hjartaliga, fyri allan stuðul og hjálp frá ymiskum samkomum og einstaklingum í samband við keypi av Juvel II.

Takk fyri allar bønir og forbønir í farnari og komandið tíð fyri verkinum, nú vit um fáar dagar seta kós móti Grønlandi.

Eina serliga takk fyri stórslignu mótøku tá skipið legði at í Klaksvík.

**Vegna Juvel II**
**Óli og Herman**